# Tá Tjaldrið sleipaði Star Finlandia av Grønlandsmiðum til Danmarkar.

Í Dimmu 29/12-09

Umborð á Tjaldrinum tann 8/8 - 1991 var manningin í holt við at rudda upp eftir eina oljudálking á Oyrunum í Vági, tá teir fingu boð um at fara eftir M/S Star Finlandiu, sum hevði mist róðrið 120 fjórðingar í útsynning úr Kappanum. Tjaldrið gjørdi seg lidna við uppgávuna í Vági, áðrenn farið var. Út í móti midnátt dagin eftir var hetta arbeiði liðugt. Tjaldrið fór nú av Vági sama kvøld og setti kós vestur móti Kappanum. Tað vóru 1200 fjórðingar at sigla, og ferðin vestur um hav gekk væl. Tjaldrið var frammi hjá Star Finlandiu týsdagin 13/8 eftir at hava siglt í 110 tímar.
Sett var nú fast á Star Finlandia kl. 19.00, og farið var undir at sleipa móti Hanstholm. Ferðin kom móti 7 sjómílum. Av tí at motorurin á Star Finlandiu var í ordan, vóru teir bidnir um at koyra á fyri at økja um ferðina. Hetta var nú roynt, men tá fór Star Finlandia bert út í annað borðið, so hetta gjørdi meira skaða enn gagn.
Síðan bleiv roynt at heingja ymiskt tilfar afturút á Star Finlandiu, men tað hjálpti bert stokkuta tíð, tí tá skrædnaði ella slitnaði burturúr. Til endans var riggaður ein stórur gulur fiskakassi til, og hann helt Star Finlandiu nøkulunda á kós allan vegin til Hantsholm.
Star Finlandia sigldi við motorinum ímillum “slow” og “hálva ferð”, soleiðis at samlaða sleipiferðin bleiv nú millum 8 og 9 sjómíl.

**Port King verður tikin.**

Mánamorgunin 19/8 kl. 06.00, tá Tjaldrið er komið aftur í føroyskt sjóøki, sigla teir fram við nøkrum garnaboyum, og nakað eftir hetta varnast teir eitt ekkó á radaranum. Mistanki er um útlenskan garnabát. Vakthavandi stýrimaður ger av at varskógva skiparan, og hann kemur á brúnna beinanvegin.
Skiparin yvirtekur nú leiðsluna og ger av at kanna hetta nærri. Boð verða givin til Star Finlandiu um at sleppa sleipiendanum. Veðrið er av ti allar besta. Tá endin er komin umborð, setir Tjaldrið fulla ferð á báðar motorarnar. Kl. 07.55 er Tjaldrið komið upp á síðuna á áðurnevnda ekkóið. Hetta vísir seg at vera garnabáturin Port King. Skipið er merkt at vera heimahoyrandi í London, og eru teir í ferð við at draga gørn 34 fjórðingar inni á føroyskum sjóøki. Roynt var at fáa samband við Port King yvir VHFin, men vísti hetta seg at vera sera striltið. Avrátt var nú at senda styrkt kanningarlið umborð á Port King, tí trupulleikar høvdu fyrr verið við útlenskum garnabáti. Kl 08.55 var kanningarliðið av Tjaldrinum komið umborð á Port King. Kanningar vóru nú gjørdar av veiðu og reiðskapi, og skipspappírini vóru eisini gjøgnumgingin. Tað visti seg, at skipið onki fiskiloyvi hevði í føroyskum sjógvi. Skiparin á Port King upplýsti annars, at umframt tey gørn, sum drigin vóru, meðan kanningarliðið av Tjaldriinum var umborð, høvdu teir ein trossa við 150 gørnum standandi aðrastaðni í føroyskum sjóøki. Skiparin var nú gjørdur varðugur við, at hann fiskaði ólógliga og uttan fiskiloyvi, og hann var biðin um sigla til lands, so rætturin kundi avgera málið. Skiparin mótmælti ikki at koma við til Havnar, og var annars samstarvssinnaður.

Tjaldrið kundi ikki fara til Havnar við Port King,tí Star Finlandia lá jú og bíðaði, og Olavur Halgi var ikki tøkur. Heitt var á Marinustøðina um at lata Beskytteren fylgja Port King til Havnar, og eftir tingingar aftur og fram var hetta játtað. Kl. 12.00 kom tyrlan hjá Beskytteren við teirra kanningarliði, sum var lorað niður á Tjaldrið. Hesir vóru so fluttir umborð á Port King, og kanningarliðið av Tjaldrinum kom umborð aftur. Tjaldrið lá hjá Port King til Beskyttern kom. Kl. 20.00 var Beskyttern har, og lítla løtu seinni boðaði hann frá yvir VHFin, at teir høvdu yvirtikið Port King.

**Tjaldrið tekur sleipið uppaftur.**

Nú var so farið aftur eftir Star Finlandiu. Gingnir vóru 16 tímar, síðan Tjaldrið hevði slept teimum. Hesa tíðina lá Star Finlandia og rak. Sum áður sagt, var verðið av tí allar fagrasta. Kl. 23.00 var klárt at sleipa. Nú var ferð sett á og kós sett móti norðurstrond Jútlands.
Ferðin hjá Tjaldrinum kom upp aftur á 8-9 sjómíl um tíman. Nú gekk sleipið ótarnað burtursæð frá smáum steðgum fyri at bøta um slitverjuna á sleipitrossanum.
Tann 23/8 kl. 05.00 var Tjaldrið út fyri Hanstholm, og við hjálp frá sleipibáti og loðsi var Star Finlandia løgd at bryggju í Hanstholm. Har var avgjørt, at Tjaldrið skuldi sleipa Star Finlandiu til Hirtshals. Tá teir høvdu lossað umleið 500 tons upp í Hansholm fóru 2 kavarar frá Tjaldrinum - eftir ynski frá skiparanum á Star Finlandiu - niður at hyggja at róðurstammuni.
Kavararnir kundu bert staðfesta, at tann stóri møtrikkurin, ið skal halda róðrinum uppi í róðurstammuni, var skrúvaður úr, og at róðrið var vekk.
Kl. 20.00 var aftur farið undir at sleipa, nú ímóti Hirtshals. Hetta var ikki nakað langt sleip. Longu kl. 02.30 kom loðsur og sleipibátur út úr Hirtshals. Saman við sleipibátinum var Star Finlandia løgd at bryggju í Hirtshals. Klokkan fimm um morgnunin 24/8 fór Tjaldrið út um havnamolarnar í Hirtshals og setti kós ímóti Føroyum. Eitt langt sleip var at enda komið, og ferðin til Føroyar gekk væl. Tjaldrið kom á Havnina mánamorgunin 26/8 kl. 06.20. Tá hevði Tjaldrið siglt 3500 fjórðingar, síðan tað var farið úr Føroyum 9. august.

**Beskyttern kemur á Havnina við Port King.**

Beskyttern kom í øllum góðum á Havnina við Port King týsdagin 20. august. Løgreglan var sum vant á keiini fyri skipinum. Skiparin var avhoyrdur av løgregluni, og hann viðgekk at hava fiska í føroyskum sjógvi uttan loyvi. Eisini viðgekk hann, at tað vóru hansara gørn, ið stóðu har á leiðini, og sum tað eydnaðist at finna og tikið innanborða.
Fútin legðii nú sektaruppskot fyri skiparan, og tað ljóðaði upp á 100.000 kr. í bót, og at hald varð løgd á veiðu og reiðskap. Virði á hesum var mett til ávikavist 320.300 kr. og 70.700 krónur. Skiparin tók ikki av hesum sektaruppskoti, og tí fall dómur í málinum, og ljóðaði hann upp á somu upphædd.

Port King var nú liggjandi á Havnini líka til 28. august, og ikki kann sigast annað, enn at hesir spaniólar gjørdu nógv um seg í býnum, og tá teir skuldu fara avstað aftur, vildu nakrir av manningini ikki við aftur skipinum.
Ætlanin var, at Port King skuldi fara aftur á Rock All leiðina at taka nøkur gørn upp, sum vórðu sett um tað mundið. tá skipið var tikið, men partur av manningini noktaði fyri at fara við aftur skipinum. Løgreglan var tí boðsend at syrgja fyri, at menninir komu umborð, og tað eydnaðist eisini, men ikki uttan trupulleikar, tí fleiri av monnunum høvdu drukkið og vildu ikki við.
Ein teirra stakk enntá av og tók til beins inn eftir bryggjuni, men løgreglan fór alt fyri eitt eftir honum, fekk fatur á honum, og saman við hinum varð hann fluttur umborð á Port King, sum stutt eftir legði frá landi.
Løtu eftir, at loyst var frá bryggjuni, lupu nakrir av manningini, sum ikki vildu við, á bláman. Løgreglan tók teir upp og royndi síðani at fáa teir umborð aftur.
Trupulleikar stóðust av hesum, og ikki fyrr enn dagin eftir fekst endi á søguni, tá teir 7 menninir, ið ikki vildu umborð aftur á Port King, av tí at teir ikki dámdu skiparan, við flogfari vóru fluttir til Danmarkar. Reiðaríið hevði givið loyvi til tess og goldið flogferðaseðlarnir
Flogfelagið, sum flutti menninar til Danmarkar, kravdi, at flutningurin skuldi gerast saman við løgregluni. Tað fóru 3 løgreglumenn við til Danmarkar. Teir skuldu ansa eftir sponsku sjómonnunum, og at trupulleikar ikki stóðust av teimun undir ferðini.
Tilsamans vóru 18 mans mynstraðir umborð á Port King. Tá skipið endiliga fór úr Føroyum, vóru bert 11 eftir umborð

**Heimildir:**

Skipsdagbøkur av Tjaldrinum 1991
Dimmalætting 1991
Sosialurin 1991